FISKIMÁLASTÝRIÐ
AÐALSKRIVSTOVAN

Tórshavn, tann 20. apríl 2001
J.Nr.: 20000342-20 / 140
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: AK/KM

Tygara skriv

Løgtingið
Landsstýrismálanevndin
Postboks 208
110 Tórshavn.

Víst verður til brævaskiftið millum landsstýrismannin í fiskivinnumálum og Landsstýrismálanevndina viðvíkjandi málinum um tunfiskaloyvir – tykkara j. nr. 7.13-2000003.

Seinasta skriv í hesum máli er frá landsstýrismanninum, har Landsstýrismálanevndin verður biðin um "at greina nærri, hvørji tey viðurskifti eru, sum ikki eru nóg væl svarað ella lýst í hesum máli". Landsstýrismaðurin hevur ikki fingið nakra skrivliga greining, men er av skrivaranum hjá nevndini munnliga kunnaður um, at tað, sum málið veruliga snýr seg um er, at Landsstýrismálanevndin hevur ta fatan, at føroysk feløg ella einstaklingar hava latið útlendskum skipum (japanskum) rættindi at veiða tunfisk í føroyskum sjógvi ímóti gjaldi.

Tey útlendsku skipini hava ikki verið til royndarfiskiskap grundað á fiskirættindi umsett sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, men grundað á royndarloyvi, sum Fiskimálastýrið hevur skrivað skipunum við støðið í eini avtalu millum Fiskirannsóknarstovuna og skipið. Lógin um vinnuligan fiskiskap heimilar umseting av fiskidøgum (§ 14) og av kvotum (§ 15) millum skip eftir ávísum treytum. Føroysk feløg hava fingið tilsøgn frá Fiskimálastýrinum um samstarv við útlendsk skip. Ein slík tilsøgn kann ikki við heimild í lógini um vinnuligan fiskiskap umsetast.

Spurningurin um umseting av fiskirættindunum at veiða tun hevur verið frammi fyrr í brævaskifti millum landsstýrismannin í fiskivinnumálum og Landsstýrismálanevndina. Í skrivi dagfest 21. september 2000 ynskti Landsstýrismálanevndin m.a. at fáa at vita, um útlendsk skip veruliga hava rindað samsýning fyri at fáa royndarloyvi til viðkomandi, sum hevur havt tilsøgn um royndarloyvi. Landsstýrismaðurin svaraði tá, at "Fiskimálastýrið hevur í málsviðgerðini ongan faktuellan kunnleika fingið til møgulig peningalig viðurskifti millum føroysku feløgini og teir japansku samstarvspartarnar. Aftaná at málið varð reist í tinginum sum fyrispurningur til landsstýrismannin og í tí almenna kjakinum í kjalarvørrinum av orðaskiftinum á tingi, sýnist tað sum um, at tey útlendsku feløgini hava rindað føroysku samstarvsfeløgunum samsýning."

Eisini í øðrum brævaskifti millum landsstýrismannin í fiskivinnumálum og Landsstýrismálanevndina hevur spurningurin um veiðurættindini hjá teimum útlendsku skipunum áður verið

30. APR. 2001
Løgtingið j. nr.
7.13-2000003 18

YVIRI VIÐ STROND 17 - 19 • POSTSMOGA 347 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 30 30 • TELEFAX 35 30 35
E-MAIL: FISK@FISK.FL.FO

viðgjørdur. Í hesum sambandi skal verða víst til skriv frá Landsstýrismálanevndini, dagfest tann 2. juni 2000, har m.a. spurt verður, um treytir t.d. eru settar um, at loyvið ikki kann seljast til japanska skipið, ella verða treytað av samsýning annars. Landsstýrismaðurin svaraði hesum spurningi soleiðis: "Tilsøgnin um royndarloyvi fyri japansk skip verður latin einum føroyskum felagi, men sjálvt loyvið verður latið tí japanska skipinum, sum føroyska felagið samstarvar við. Fiskimálastýrið hevur ikki sett treytir viðvíkjandi samstarvinum – herundir peningaligum samstarvi – millum tað føroyska felagið og umboð fyri tað japanska skipið."

Um Landsstýrismálanevndini tørvar fleiri upplýsingar, er hon væl komin at venda sær aftur til Fiskimálastýrið við neyvari greining um, hvat tað er, sum nevndin ynskir at verða kunnað meiri um.

Vinarlig heilsan

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

Kaj P. Mortensen
aðalstjóri